# Eldur í einum sethúsum í Hvalba

**Á middegi í gjár kyknaði eldur í einum sethúsum í Hvalba. Eftir 20 minuttir, var eldurin longu sløktur.**

ELDUR
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Løgreglan á Tvøroyri váttar, at eldurin kyknaði í hjallinum, sum er fastur í sethúsunum. Eldurin breiddi seg tíbetur ikki inn í húsini, sum tó hava fingið stóran vatn- og roykskaða:

- Enn vita vit ikki við vissu, hví eldurin kyknaði, men vit væntar, at skammlop var orsøkin til tess, sigur løgreglan á Tvøroyri.

Eingin mannskaði stóðst av hendingini.









## Listaframsýning í Müllers pakkhúsi

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri teirri væl–umtóktu listaframsýningi í Müllers Pakkhúsi á Ólavsøku.

Í ár verða umleið 30 framsýnarar við og lista–verkini verða omanfyri 100 í tali.

Hendan framsýning hevur vunnið sær pláss sum fastur táttur í hugaheiminum hjá fleiri ólavsøkugestum, tí talið av vitjandi veksur støðugt og vóna vit sjálv–andi eisini at so verður í ár.

Seinastu árini hevur framsýningin verið í Mül–lers Pakkhúsi, og tað verður hon eisini í ár.

Listaframsýningin letur upp Ólavsøkuaftan 28. juli kl. 14.00

Opið er eisini Ólavsøku–dag og sunnudagin 30. juli.

Latið verður upp kl. 14.00 og latið verður aftur kl. 20.00 allar dagarnar.

Atgongumerkini eru við í lutakastinum um ein mál–ning, sum borgarstjórin í Tórshavn, Heðin Mortensen hevur málað og latið sum gávu til Lions.

Avlopið av listafram–sýningini, fer eins og allur peningur, ið Lions Club letur til vælgerandi endamál.

## 32 sent uppskot inn til búmerkjakpping hjá Løgtinginum

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

**Tá freistin var úti mánadagin at luttaka í búmerkjakappingini hjá Løgtinginum, høvdu 32 fólk sent uppskot inn**

Herfyri skrivaði Løgtingið út búmerkjakapping, og tá freistin var úti mánadagin, høvdu 32 fólk sent uppskot til kappingina.

Ætlanin er, at eitt búmer–ki skal lýsa arbeiðið og uppgávurnar hjá tingi–num, og í dómsnevndini sita formansskapurin í Løgtinginum, Palli Gre–goriussen, arkitektur, Ingi Joensen, grafiskur de–signari, og Hansina Iversen, listakvinna.

Løgtingið tilskilar sær rætt til at velja frítt, um vinnarauppskotið verður brúkt til endaliga búmerkið, og av Løgtingsskrivstovuni verður sagt, at tey vænta, at vinnarin helst verður funnin skjótt.

## Fólkafundur á Doktara–grund

Aftur í ár skipar Unga Tjóðveldið fyri fólkafundi á Doktaragrund. Í fjør var fundurin so væl vitjaður, at ikki øll, sum vitjaðu fundin sluppu til. Forkvinnan í Unga Tjóð–veldinum, Barbara Holm, sigur, at skráin ár verður nakað tann sama sum í fjør, og at tey tí rokna við nógvum fólki.

Í høvuðsheitum verða tað røður, tónleikur og skemt, sum fara at merkja fólkafundin.

Carl Jóhan Jensen fer at lesa upp sama prosa–verk, sum hann gjørdi á bókmentatiltakinum á G! Hetta stykkið, um tilvitan føroyinganna, var ógvuliga væl umtókt millum áhoyrararnar á bókmentatiltakinum, og tí hevur Unga Tjóðveldið heitt á Carl Jóhan Jensen at lesa sama stykkið upp á fólkafundinum á ólavsøku.

Men Carl Jóhan Jen–sen verður ikki einasti røðarin. Formaður Tjóð–veldisfloksins, Høgni Hoydal, fer eisini at siga nøkur orð, umframt at onkur røðari verður aftrat.

Annars verður bæði skemt og tónleikur á skránni. Uni Debes úr GoGo Blues fer at spæla tónleik, meðan tað enn ikki er endaliga avgreitt, hvør skal taka sær av skemtinum, tí har eru so nógv boðið.

Fólkafundurin, Unga Tjóðveldið skipar fyri, verður á Doktaragrund leygardagin kl. 19.00.

**-rwd**

# Kristnastova við sangløtu á Bryggjuni

Eins og undanfarin ár skipar Kristnastova í Keypmannahavn fyri sangløtu á Bryggjuni ólavsøkuaftan kl. 19, har m.a. sangbólkurin Sela og Arnvør á Torkilsheyggi, kend frá bólkinum SALT, koma at luttaka

Á ólavsøku í Havn eru kristiligir útifundir partur av skránni, og evangelisku sangirnir plaga at hoyrast við megi á havnargøtum. Soleiðis verður tað nokk ikki á ólavsøkuhaldinum í Keypmannahavn, men tó verður aftur í ár ein sang–løta við andaligum sangum hildin uppi á loftshæddini í bygninginum á Bryggjuni ólavsøkuaftan kl. 19.

Tað er Kristnastova, sum skipar fyri hesari sangløtu, og á skránni eru bæði felagssangir og sangir, ið verða framførdir. Sangbólkurin Sela fer at luttaka, og harumframt fer Arnvør á Torkilsheyggi, kend frá bólkinum SALT, at syngja einstakar sangir.

Síðani ólavsøkan byrjaði á Bryggjuni í 2004 hevur hendan sangløtan verið fastur partur av skránni, og tey eru mong, sum undan–farnu ár hava leita inn í høllina í erva - bæði fyri at lýða á og at syngja við. Og fyrireikararnir vóna, at hetta tiltak enn einaferð fær góða undirtøku.



## Fólkafundur á Háskúlanum

Árligi fólkafundurin á Háskúlanum á ólavsøku verður fríggjadagin kl. 17.30 - aftan á kapp–róðurin.

Tað verður Fríðfinnur Johnsson, formaður í Há–skúlastjórnini, sum fer at bjóða fundarluttakarunum at vera vælkomin á fund. Felagssangur ver–ður og Bergur Rønne Moberg, sum er annar av blaðstjórunum á Outsider Magazin, fer at halda eina røðu.

Aftan á verður farið upp á gólv, og annars verður opið hús og ein drekkamuður at fáa.

**-rwd**